# Masterskeið í Upplýsingasókn/ information Retrieval

Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum bjóðar skeið á masterstigi í Upplýsingasókn – eisini á fakmáli kent sum »Information Retrieval«. Skeiðið byrjar í viku 42 og endar í viku 50.

Fyri at luttaka á skeiðnum skalt tú hava staðið bachelorprógv innan KT ella kunna vátta tilsvarandi førleikastig. Skeiðið endar við próvtøku í januar 2007.

Umsóknarfreistin er 20. september 2006. Tilmelding fer fram við umsóknarblað, ið fæst á www.nvd.fo

Skeiðsgjaldið er kr. 4.000,- sum má vera goldið, tá ið skeiðið byrjar. Umsøkjararnir fáa gjaldskort frá Føroya Gjaldstovu.

Meir fæst at vita um skeiðið á heimasíðuni www.nvd.fo og við at venda sær til skeiðsleiðaran Silviu Lauritsen, silvia.lauritsen@mac.com

# Menningarskeið á háskúlanum 2006

**Frá 26. september til 6. oktober verður eitt skeið á Føroya Fólkaháskúla fyri vaksin menningartarnað.**

Vit fara m.a. at arbeiða við

- okkum sjálvum
- handaligum arbeiði
- upplivingum av ymiskum slag

Fyri at kunna luttaka skalt tú vera yvir 20 ár, umframt at tú skalt vera sjálvbjargin í flestu førum.
Starvsfólk frá serstovnaøkinum vera við, umframt pedagog-næmingar.
Kom við um tú hevur hug, her eru møguleikar fyri bæði upplivingum og andarúmi.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1.950,-

**Tilmelding áðrenn 15. september 2006 hjá Jónu á tlf. 456976 ella hjá Hildur á tlf. 221233, millum kl. 8.00 og 16.00.**

(Vegna hølisviðurskiftini kunnu koyristólsbrúkarar tíverri ikki luttaka.)

**Føroya Fólkaháskúli**
**Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn**
**Telefon 31 17 43 - Telefax 31 96 87**
**Teldupostur: ffh@skulin.fo**

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Røktarheimið á Mørkini, 435 Streymnes

# Røktarheimið á Mørkini Søkir eftir heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum

Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimarøktini Vágar/ Norðstreymoy.

Á Røktarheiminum á Mørkini eru 32 búpláss býtt út á 4 eindir við 8 búplássum á hvørjari eind. Til hvørja eind er felags køkur og stova. Búeindirnar eru sambundar av einum meginbygningi, ið umfatar meginkøkin, hølir til ergo- og fysioterapi og sal til felagstiltøk á heiminum. Aðalsetningurin fyri heimið er, skapa eitt so heimligt og livandi umhvørvi sum gjørligt.

Heimið opnaði í maj 2006 við 16 røktarheimsplássum og í løtuni eru vit í ferð við at taka síðstu eindirnar í brúk. Í hesum sambandinum sóknast vit eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum at arbeiða 0,7 tíð í blandaðum vaktum at byrja 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

**Vit søkja eftir fólki:**

- við røktarfakligum royndum
- hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- hevur áhuga fyri at starvast innan elddrarøkt
- kennir gleði við at vera saman við gomlum fólki.

**Vit kunnu bjóða:**

- góðar arbeiðsumstøður í nýggjum heimi
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við nógvum avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini eru lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til deildarleiðaran á Mørkini á telefon 505440.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av autorisatión, prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Røktarheimið á Mørkini**
435 Streymnes

**Att: Annika Vágsheyg**

**Umsóknarfreist: 27. september 2006.**

Lesið Sosialin -tað loysir seg



# Hundur til sølu

Slag: Samojed. Hundurin er hvítur og hevur stammtalvu. Hundurin er 3 mðr. gamal.

**Tlf. 31 72 13**

Lesið Sosialin - so eru tit við